# roll til fólkið

**Sosialurin hitti Shakin´ Stevens aftaná framførsluna í Tivoli. Les samrøðu við pop-stjørnuna í Vikuskiftisblaðnum.**



*Shakin´Stevens framførdi við fullari ferð í Keypmannahavn farna vikuskiftið. Allir teir góðu, gomlu sangirnir hjá honum vóru at hoyra, og tað var lív í tí stóru áhoyrarafjøldini*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

sum vit sóu tveir tímar undan konsertini sitandi frammanfyri pallin.

Hvussu leingi tey bíðaðu, vita vit ikki, men vit mugu taka hattin av fyri tí tolni, sum tey hava víst hetta kvøldið. Alt fyri eina aldrandi stjørnu úr Cardiff.

er nakar ársungi longur, so hevur hann framvegis ta orku, sum krevst til slíkar framførslur.

Eftir ein stuttan steðg kom hann útaftur á pallin (tað var sjálvandi væntandi, at hann spældi nøkur eykaløg aftaná steðgin). Og tá fýrdi hann millum annað This Ole House og onnur kend hit av. Framførslan vardi ein tíma og tjúgu minuttir, og áhoyrararnir keddu seg í øllum førum ikki hesa tíðina.

Tað, at navnið lokkar 20.000 fólk inn í Tivoli at lýða á 57 ára gomlu stjørnuna úr Wales, ber boð um, at eftirspurningurin eftir Shaky framvegis er í hæddini. Hansara nýggjasta uppsamlingsfløga hevur selt sum heitt breyð, og konsertirnar í Bretlandi og Norðurlondum eru nærum allar útseldar. Maðurin hevur ikki havt eitt nýtt hit á hitlistunum í meira enn fimtan ár, men hóast hetta hevur tann trúgvi lurtaraskarðin ikki vent honum bakið.

Ei undur í at fyrireikararnir av Summarfestivalinum eru ernir av, at teir hava fingið Shakin´ Stevens at framføra á Vágsbøi í ugustmánað.

Tá vit venda nøsini heimeftir eftir at hava verið backstage og heilsa uppá Shakin´ Stevens, standa nøkur fá tandur við penni og blokki uttanfyri dyrnar. Hetta er óivað tey somu,









## Heimsgitna Jane Verity til Føroya

### Skeið um Demens á Hotel Hafnia 1. og 2. juni 2005

”Tú kanst tendra lívsneistan aftur hjá fólkum við demens.”

Tað er ein av boðskapunum á skeiðnum, sum Alzheimerfelagið skipar fyri á Hotel Hafnia 1. og 2. juni. Skeiðið er ætlað fólkum, sum arbeiða innan eldraøkið.

Tað er tann viðurkendi ergo- og familjuterapeuturin Jane Verity, ið hevur skeiðið. Hon hevur stovnað ráðgevingarmiðstøðina ”Dementia Care Australia”, sum hon eisini er leiðari fyri. Hon er høgt í metum og nógv eftirspurd sum fyrilesari. Hon er fødd í Danmark, og undirvísingin fer fram á donskum.

Hennara fyrilestrar eru merktir av hennara brennandi áhuga fyri menniskjum við demens. Hon megnar at geva luttakarunum nýggj hugskot og íblástur til at tora at ganga nýggjar leiðir innan økið. Hon sær demenstrupulleikan úr einum øðrum og óvanligum sjónarhorni og stríðist fyri at broyta almenna hugburðin til sjúkuna.

Skeiðið byggir á hennara hugsjón, ið er grundað á fatanina, at til ber at kveikja lívsneistan aftur hjá fólkum við demens, hjá avvarðandi teirra og hjá teirra hjálparfólkum.

**Skráin 1. og 2. juni kl. 9-15**

**1. juni: Nýggja demensmentanin**
Í staðin fyri at seta fokus á demens, verður sett fokus á allan persónin. Við at fokusera á allan persónin kunnu vit betur hjálpa menniskjum við demens.

**2. juni: Lær at skilja og samskifta við fólk, ið hava sjúkuna demens**
Hendan dagin fáa luttakaranir innlit í, hvørjar persónligar grundgevingar liggja aftan fyri alt tað, ið ein persónur við demens ger. Samstundis læra vit um torføra samskiftið við persónar við demens. Vit læra, hvussu teir kunnu læra at minnast betur, og hvussu teir framvegis kunnu velja sjálvir.

Skeiðkostnaður 2000 kr. við morgunmati, døgurða og kaffi.

Tilmelding við telduposti í seinasta lagi 21. mai.

**Skriva til**
flesin@post.olivant.fo ella sigmo@post.olivant.fo. Eru spurningar, kanst tú ringja á telefon 214383.

**Almennur fyrilestur**

Á føroyaferðini hjá Jane Verity er eisini ein fyrilestur fyri almenninginum á skránni. Hann verður 3. juni klokkan 19 í hølunum hjá Føroya Tele. Kostnaður 50 krónur.

”Lær at síggja við hjartanum” er heiti á almenna fyrilestrinum. Hetta er nýtt sjónarmið um demens.

ALZHEIMER felagið

www.alzheimer.fo

SANSIR TEL 355 355